## Lítil áhugi fyri ES-vali

Sviar hava eftir øllum at døma ikki serliga stóran áhuga fyri, hvør situr í Evropatinginum. Í hvussu er vísir ein nýggj meiningakanning, at minni enn helmingurin av veljarunum ætla sær á val, tá Evropatingið skal mannast tann 7. juni. 48 prosent av teimum spurdu siga, at tey ætla sær á val, men 52 prosent ætla sær at sita við hús valdagin. 64 prosent siga beinleiðis, at tey hava lítlan ella ongan áhuga fyri valinum. Hetta er kortini ikki nakað nýtt, tí tá sviar seinast valdu umboð í Evropatingið í 2004, vóru bara 37,8 prosent av veljarunum á vali. Svøríki hevur verið uppi í ES síðani 1995.



## Rottangadagur í Nólsoy

Í dag var tann stóri rottangadagurin í Nólsoy. Tórshavnar Kommuna sendi klokkan átta í morgun tríggjar tangabilar til Nólsoyar við Sam at tøma rottangarnar hjá teimum umleið 100 húskjunum, sum búgva í Nólsoy. Tveir av bilunum vóru frá IRF og ein frá Kommunalu Orku- og Brennistøðini hjá Tórshavnar Kommunu.




*Tað eru tílíkir lítlir pakkar, sum TAKS ofta møtir í postinum. Talan er um evni, ið kunnu nýtast til rús*

# Soleiðis innflytur tú ecstasy

**Far á eina kinesiska heimasíðu. Har finnur tú evnið, ið tú kallar fyri baðisalt, sum tú síðani fært tey at senda til tína adressu. Kemur góðsið fram, so er tað bara fínt. Í ringasta føri verður evnið tikið í postinum. Men tú verður ongantíð tikin fyri at royna at innflyta eitt rúsandi evni, ið líkist ecstasy heilt nógv**

RÚSEVNI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað gerst alsamt vanligari. Fólk bileggja sær rúsevni, sum síðani koma við postinum. Hesi rúsevnini eru ikki júst sum upprunaliga evnið, men heldur er ein lítil broyting gjørd í strukturin á evninum, so evnið ikki longur er beinleiðis rúsevni á listunum hjá landinum. Ofta verður navnið eisini lagt í annan ham, soleiðis at móttakarin kann halda fast um, at talan er um baðisalt, sjampo ella okkurt annað, ið ikki skal inntakast í kroppin, tí á pakkanum stendur, at tað ikki er til menniskju.

- Eg havi eitt fornemmilsi av, at hetta vindur uppá seg, men fólk verða ikki revsaði fyri hesi evni, hóast tey í prinsippinum eru ólóglig, staðfestir Brynjer Johannesen, narkopolitistur. Hetta er talan um evni, sum bróta apotekslógina, men ikki rúsevnislógina, og tí er í veruleikanum ikki talan um uppgávur hjá narkopolitinum, hóast evnini líkjast heilt nógv vanligum rúsevnum.

- Tað er sjálvandi ikki í lagi, at rúsevni, sum líkjast nógv ecstasy, kunnu flytast inn soleiðis, men so leingi ongin lóg er, so fáa vit onki gjørt, staðfestir Brynjer Johannesen. Hann leggur afturat, at bíðað verður eftir, at lógin verður broytt.

Hann vísir eisini á, at narkopolitiið hevur eyguni eftir hesum evnum, hóast tað í veruleikanum ikki er teirra trupulleiki, tí evnini fara ikki inn í revsilógina enn.

### Fýra í seinastu viku

Hjá TAKS kenna tey væl til hesi evnir, og fleiri tilburðir eru, samstundis sum tað eru tey somu fólkini, sum fáa hesi evni sendandi.

- Vit høvdu til dømis fýra tilburðir í seinastu viku, so vit finna rættiliga nógv, sigur Annsy Høghamar, tollserfrøðingur. Hon leggur afturat, at tað eru øll møgulig sløg, sum koma til landið, og so hyggja tey at, um tað er lógligt ella ikki.

- Vit kenna rættiliga nógv av evnunum, og serliga verður orðið »baðisalt« brúkt um nógv av hesum evnum. Og tá vit ivast, hvat vit skulu gera við evnið, so senda vit tað til kanningar hjá landsapotekaranum ella hjá narkopolitinum, greiðir Annsy Høghamar frá.

Tá evnið síðani er kannað, og tað verður fram til, at tað er á markinum til føroyska lóggávu, so sendir postdeildin hjá TAKS eitt bræv út til fólkini, har tað stendur, at tann, ið hevur bílagt henda pakka, skal koma eftir honum og gera krav uppá hann.

- Og tá er tað næstan altíð, at fólk ikki koma eftir pakkanum, staðfestir Annsy Høghamar. Hon veit eisini at greiða frá, at tað ikki er TAKS, sum rættarsøkir hesum fólkunum, tí TAKS sendir bara evnini víðari.

### Brúka grásonuna

Hjá landsapotekaranum hava tey fingið nøkur av hesum evnum og kanna tey, men tey hava heldur onki við málið at gera.

- Tað einasta vit hava gjørt, so hava vit loyst kemiska spurningin, sigur Heri Mørkøre, landsapotekari.

Hinvegin dugir hann øgiliga illa at síggja, um hesi evnini veruliga kunnu nýtast til baðisalt, tá tað vísir seg, at tey kunnu hava eina effekt, á sama hátt sum heilivágur og tí kann vera tað, umframt, at tey kunnu geva ein rús.

Hann leggur afturat, at hetta hesi evnini eru í eini grásonu, sum í summum londum er stór, og í øðrum londum er heldur minni.

- Veruligi spurningurin er, um vit eru nóg væl fyri viðvíkjandi innflutningi av kemikalium, staðfestir hann, og greiðir víðari frá, at bæði vitan og kreativitetur hjá fólkunum, ið innflyta hesi evni er nógv størri, enn mann kann ímynda sær.

Men hann hevur heldur ikki nakra loysn við hondina.

- Vit kundu altíð latið staðið til, tí innflutningurin verður helst ikki størri enn tað sama, metir hann, men hann leggur afturat, at vit eisini kundu at hugt at okkara lógarverki, um tað kanska var onkur mangul har.

Sosialurin hevur roynt at fáa fatur á Bergleifi Brimvík, kriminalovasta, men hann hevur ikki verið at fáa fatur á at svara, hvat løgreglan ger við tílík mál. Somuleiðis hevur Sosialurin tosa við fólk innan ákærumyndugleikan, men tey dugdu ikki at upplýsa, um nøkur tílík mál eru í rættarskipanini.